

# HJÁLPARFÓLK
## TIL VØRUHANDFARAN

### Vit sóknast eftir einum hjálparfólki til vøruhandfaran

**Vit kunnu bjóða tær**
Eitt áhugavert starv sum hjálparfólk í vøru-toyminum, har tú m.a. fært ábyrgd av at fylgja vøruni frá móttøku til vøran stendur á hillini við rættari merking og prísi.

**Førleikar**
Tú ert ágrýtin, nærløgd/-lagdur og hevur hug at arbeiða við góðskustýrdum mannagongdum. Tú ert fleksibul og dugir væl at arbeiða í toymi.

**Starvið**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Elisabeth Joensen-Næs á tlf 341100.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

www.grafikmaster.fo

**Tjaldurs Apotek**

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. januar 2011.
Umsóknir við próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast við brævi til:
**Tjaldurs Apotek ▪ Postboks 3010 ▪ 110 Tórshavn ▪ www.apotek.fo**

# LÆRLINGUR

Søkt verður eftir HVS Lærlingi til

## pf Maria Poulsen

Vit vænta at tú ert raskur/røsk og Fyrikomandi. Koyrikort er Eitt krav.

Ert tú tann rætti persónurin, ert tú vælkomin at senda eina umsókn. Til ap@mp.fo
Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14.02.2011

**P/F Maria Poulsen**
**Smyrilsvegur 8**
**Postboks 182**
**FO 110 Tórshavn**



Meiri fæst at vita við at ringja til Arthur Poulsen á tlf. 312 000 Ella send ein mail á ap@mp.fo

## pf Maria Poulsen
Box 182 · FO-110 Tórshavn

P/F Maria Poulsen er størsta HVS virkið í Føroyum við handli,verkstaði og búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.

**almannastovan**
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



## Stjórnardeildin søkir LØGFRØÐING ella SAMFELAGSFRØÐING

**Talan er um eitt barnsburðaravloysarastarv frá 1. februar 2011, ella so skjótt sum gjørligt og fram til 1. juni 2012.**

Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur løgfrøðisligt ella samfelagsfrøðisligt prógv frá lærdum háskúla, ella aðra hóskandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum.

Fulltrúin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at viðkomandi er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Arbeiðsuppgávunar hjá fulltrúanum fevna um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk, ummælan av uppskotum til lógir og kunngerðir, málsviðgerð í ávísum málum, tilevnan av leiðbeiningum og kunningartilfari, luttøku í tvørfakligum samstarvi og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 28. januar 2011.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Starvsfólkadeildin
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096
110 Tórshavn.

*Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.*

*Á Stjórnardeildini eru 4 starvsfólk og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til stovnin í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum. Gerð av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum. Herumframt er Stjórnardeildin skrivstova hjá pensiónsfundinum, sum tekur avgerðir um fyritíðarpensjón o.a.i.*

KREA · TEL 60 80 80